# EYSTUROYAR DANSIFELAG

Tann 26.sept. 2015

**Skráin 2015-2016**

Vit halda til í **Hæddini, Saltangará**, vanliga **fríggjakvøld** kl 21.00 til út móti midnátt.

Í vetur hava vit valt at taka tvær vísur: Guttorms vísu (Der hersked en konge) og Hafburd konge, og trý kvæðir: Gøtuskeggjar, Kópakvæði og Dvørgamoy sum høvuðsevnir at læra í vetur. So ætla vit, at alt hitt: kvæðir, vísur og tættir verður kvøðið ad libitum, og at skiparar - bæði teir vandu og nýggir - ikki halda seg aftur, men leggja í vaðið!

Tað mesta er at finna greitt uppsett í kvæðabók okkara á **eystdans.dk** og í kvæðabókum: ANT (Fær. Anthologi), DKF (Danske kæmpe- og folkeviser), GSF (Grør so fagurt), NK (Nýggja kvæðabókin) og STF (Stígum fast).

**Landsdansistevnan** verður tann 21.mai 2016 í Klaksvík, og har er avrátt, at vit (Andras) kvøða Gøtuskeggjar til 63. ørindi, og Tøkum lætt (Óli á Geilini), tekur restina.

Nevndin arbeiðir við eini **uttanlandsferð** í summar. Meiri um tað seinni.

**Vertir** hava vit sett uttan at spyrja; annars taka vit øll eina hond í – eisini mannfólkið.

23/10-15 Hin føroyski dansurin, NK1. Ivan Hansen.
Hafburd konge og Sivard konge til 33. ør., DKF. Joen Carl Danielsen.
Vertir: Margretha og Marita P.

30/10 Hafburd konge og Sivard konge, til 33. ør., DKF.
Dvørgamoy, til 22. ør., GSF. Louis Houmann. Vertir: Marjun og Jónhild.

06/11 **Norðstreymoyingar** á vitjan. Stundisliga kl 21.00. Kvøða til kl 23.00, tá vit steðga á at eta. Dvørgamoy, frá byrjan til 44. ør. ella sum liggur fyri.
Vertir: Nevndin.

13/11 Hafburd konge, 34. – 49. ør. J. Carl.
Guttorms vísa (Der hersked en konge), 9 ør. eystdans.dk. Ivan Hansen.
Vertir: Simona og Poula.

21/11 **Leygarkvøld!** Vitja **Vága dansifelag** í Beitinum, Miðvági. (kl. 21.00).
Bussur fer frá Hæddini kl. 19.30 – og heim aftur í sámiligari tíð.
Streingirs vísa, eystdans.dk. Anfinnur Huusgaard.

27/11 Gøtuskeggjar, til 18. ør. GSF. Andras Hansen.
Guttormsvísa, 10. – 17. ør. Ivan. Vertir: Pálin og Anna Maria.

| | | |
|---|---|---|
| 4/12 | **Á Strondum**, í Pensjonistahúsinum, Heygsstøð 3.<br>Hafburd konge, 50.ør. og út. J.Carl.<br>Kópakvæði, til 21 ør. NK 2. Karstin í Húsinum. | Vertir: Kára og Jóna. |
| 11/12 | Guttormsvísa, 18. – 26. ørind.<br>**Táttakvøld**: Kvøða stutt og lætt. | Vertir: Sonja og Esther. |
| 8/01-16 | Gøtuskeggjar, 18. til 35. ør. Andras.<br>Kópakvæði, 22. ør. til 36. ør. Karstin. | Vertir: Helena og Anna J. |
| 15/01 | **Í Glyvr'Hanusarhúsi, Norðragøtu.**<br>Gøtuskeggjar 18. – 50. ør. Andras. | Vertir: Anna og Sanna. |
| 22/01 | **Aðalfundur**, skrá eftir lógini.<br>Gøtuskeggjar, 50. – 63. ør. Andras.<br>Kópakvæði, 37. – 51. ør. Karstin. | Vertir: Sunneva og Turid. |
| 29/01 | Vit fara til **Haraldssunds**. Felagið leigar buss: úr Hæddini kl. 21.00, steðga á vanligum støðum. Farið verður til hús kl. 02.00 – ella kl. 02.30, um dansurin er góður.<br>Kathrina leggur fyri við Norsku løvu. Tiltakið kostar kr. 100,- fyri hvønn. | |
| 05/02 | **Hugnakvøld** kl. 20.00 – ræst kjøt og súpan. Kostn. kr. 150,- Tekning.<br>Burturluting.<br>Áminning kemur seinni. | |

**Nýggjárskvøld** og **fastalávints mánakvøld** er opið kl. 21-00.30, og tá gjalda vit atgongumerki, kr 50,-. Onnur almenn dansikvøld**,** sum vit vilja vísa til: trettandadans í Sjónleikarhúsinum (Tøkum lætt), fastalávints leygarkvøld (Dansifelag Kaggans).

**Barnadansur** er ikki tilskilaður á skránni, og tað kemst av, at foreldur í Gøtu skipa fyri barnadansi í Losjuni í Gøtu mikukvøld kl 19.00 -20.00. Vit stiðja tey og ráða til, at foreldur fara hagar við børnum. Tey hava ein bólk á Facebook, har tað ber til at vera limur:
**Føroyskur dansur fyri børn.**
https://www.facebook.com/groups/208492012679760/?fref=ts

**Kunning** fáa limirnir í e-posti og á heimasíðu okkara **eystdans.dk**, har kvæðabókin eisini er. Tey, sum ikki hava e-post, fáa bræv. Á **Facebook** finnast vit undir **Eysturoyar dansifelag**. Har kunnu øll gerast limir – og vælkomin at viðmerkja.

**Limagjaldið** fyri 2015, kr. 100,- verða limirnir bidnir um at flyta – helst ikki seinni enn 1. nov. – á konto í **BankNordik 6460 407 961 4** Viðmerking við gjaldi: egið navn/nøvn. Einki annað!

Set kross, tá goldið er ☐

*Felagið er stovnað í 1969 og hevur til endamáls at savna fólk saman til góðan føroyskan dans og stimbra áhugan fyri dansinum. Limatalið er u.l. 110, og vanlig kvøld eru vit 25 – 40 fólk í dansi.*